Sunleiv Højgaard, formaður í Føroya Postfelag:

# Trivnaðurin er ómetaliga vánaligur um alt postverkið

**- Á Postverki Føroya er motivatiónin ógvuliga vánalig í løtuni. Tað er misstemningur, og trivnaðurin liggur á einum lágum støði. Vit hava havt eina akkordskipan øll árini, sum hevur virkað væl, men nú kenna vit tað, sum um vit verða dupultkekkaði, sigur Sunleiv Højgaard, formaður í Føroya Postfelag**

**POSTVERKIÐ**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í eina tíð hava tey, sum starvast á Frímerkjadeildini hjá Postverki Føroya, verið noydd at stempla, og seinni eru so stempulklokkur eisini komnar á høvuðsdeildini á Óðinshædd.

Hetta hevur eingin havt nakað ímóti.

Postboðini, sum arbeiða út frá Óðinshædd, hava verið undantikin hesi skipan, men frá 1. november er eisini álagt teimum at stempla. Hóast leiðslan sigur, at postboðini ikki verða avroknaði eftir klokkuni, er nýggja skipanin ikki fallin í góða jørð hjá limunum í Føroya Postfelag.

## Eitt haft

Sunleiv Højgaard, sum er postmaður í Saltangará og formaður í Føroya Postfelag, sigur, at postboðini kenna stemplingina sum eitt haft um beinini.

- Vit hava havt eina akkordskipan í mong, mong ár, og hendan skipan hevur virkað væl.

Hann sigur, at akkordskipanin hevur verið galdandi heilt aftur um tíðina, tá ið Postverk Føroya varð yvirtikið.

- Akkordskipanin hevur verið ein gularót, har postfólk í stóran mun hava kunnað lagt sær arbeiðsdagin til rættis. Tey hava eitt nú brúkt tíð at skilja postin kvøldið fyri og eru soleiðis sloppin fyrr út fyrr um morgunin. Hetta hevur samstundis gjørt, at tey, sum fáa postin, hava fingið hann fyrr um dagin.

Sunleiv sigur, at akkordskipanin hevur verið praktiserað soleiðis, at hon gongur yvir eina longri tíð - og við uppteljing yvir eina longri tíð. Á henda hátt hevur borið til at roknað út, um arbeiðsdagurin hjá einum postboði er passaligur, ov langur ella ov stuttur – og um hús skulu leggjast aftrat ella takast burtur av.

## Mistrivnaður

Hann vísir á, at hóast leiðslan sigur, at postboðini ikki verða avroknað eftir klokkuni, hevur nýggja skipanin ført við sær, at motivatiónin er ógvuliga vánalig í løtuni.

- Skipanin, har tú verður dupultkekkaður, hevur skapt misstemning, og trivnaðurin liggur á einum lágum støði.

Sunleiv sigur, at Postfelag Føroya hevur kannað eftir, um leiðslan hevur rætt til at seta hesa skipan í verk.

- Vit hava skilt, at tað hevur hon, men eg haldi ikki, at leiðslan hevur tikið hædd fyri tí misstemningi og mistrivnaði, sum hetta hevur skapt millum limir okkara.

Hann leggur aftrat, at postboðini hava havt eina skipan øll hesi ár, sum hevur virkað væl, men nú kenna tey tað, sum verða tey dupultkekkaði í sínum arbeiði.



*- Vit halda heilt avgjørt, at nýggja skipanin, sum varð sett í verk 1. november, ger meira skaða enn gagn fyri stovnin, sigur Sunleiv Højgaard, formaður í Føroya Postfelag, sum annars harmast um gongdina og mistrivnaðin sum heild á sínum egna arbeiðsplássi*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Sáttmálin

Tað eru ikki bara postboðini, sum eru limir í Føroya Postfelag, men postfólk sum heild, og Sunleiv leggur ikki fingrarnar ímillum, tá ið hann sigur, at trivnaðurin á Postverki Føroya sum heild er ógvuliga vánaligur í løtuni.

- Líkt er til, at leiðslan gongur sáttmálanum ov nær á fleiri økjum, og hetta hevur elvt til, at trivnaðurin á postverkinum sum heild er ómetaliga vánaligur í løtuni, sigur formaðurin í Føroya Postfelag.

Hann vísir, at arbeiðshugurin rættiliga hevur verið dalandi seinastu tíðina.

- Tað eru fleiri orsøkir til hetta, men høvuðsorsøkin er, halda vit, at leiðslan gongur sáttmálanum ov nær – og alt ov ofta hevur hug at leypa sáttmálan um, sigur Sunleiv.

## Harmast

Hann sigur, at leiðslan hevur lovað bata, soleiðis at trivnaðurin aftur kann fáast innan dyrnar á postverkinum, men hann fýlist á, at alt ov lítið ber á tað borðið.

- Vit halda heilt avgjørt, at nýggja skipanin, sum varð sett í verk 1. november, ger meira skaða enn gagn fyri stovnin, sigur Sunleiv Højgaard, sum annars harmast um gongdina og mistrivnaðin sum heild á sínum egna arbeiðsplássi.

# Ótryggleikin hevur havt sín kostnað

**- Vil vilja hava at vita, nær fólk eru í tænastu, og vit vilja eisini hava at vita, nær tænasta verður veitt okkara viðskiftafólkum, sigur Bergur í Garði, postverksstjóri**

**POSTVERKIÐ**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Stjórin á Postverki Føroya, Bergur í Garði, sigur, at starvsfólk á Frímerkjadeildini hava stemplað í nøkur ár, og tá ið partur umsitingini og giro-virkseminum varð flutt á Óðinshædd, var tað natúrligt, at hesi fólk hildu fram við somu skipan.



- Síðan eru øll tey, sum vit rópa tey vanligu skrivstovufólkini, komin undir somu skipan, og nú at enda eisini postboðini og tey, sum eitt nú fáast við at skilja post.

*- Eg skilji væl, at tann ótryggleiki, sum hevur valdað um postverkið í so langa tíð, hevur havt sínar avleiðingar – bæði fyri starvsfólk og leiðslu. Tað er altíð keðiligt, tá ið ting leingi liggja í ógreiðu, sigur Bergur í Garði, postverksstjóri*

## Tænastan

Bergur í Garði vísir á, at hóast postboð nú eisini skulu stempla, er gamla akkordskipanin framvegis galdandi.

- Postboðini arbeiða undir eini akkordskipan, sum er ellligomul og ikki dagførd. Tey møta til arbeiðis, gera sín post lidnan og eru liðug tá ella tá. Stempul-skipanin ávirkar soleiðis ikki teirra arbeiði og løn.

Postverksstjórin sigur, at tað, sum leiðslan vil við stemplingini, er, at øll skulu vera undir somu skipan.

- Vil vilja hava at vita, nær fólk eru í tænastu, og vit vilja eisini hava at vita, nær tænasta verður veitt okkara viðskiftafólkum.

Hann heldur, at hetta er ein náttúrligur partur av uppgávuni hjá stovninum.

- Tað hevur týdning fyri Postverk Føroya, nú grundarlagið er broytt, at vit vita, nær vit veita okkara viðskiftafólkum tænastu.

Bergur sigur, at stempulklokkan soleiðis einki hevur við lønarviðurskiftini hjá postboðunum at gera, tí hesi arbeiða sum nevnt undir akkordskipanini.

Hann ásannar, at hetta er ein skipan, sum eisini snýr seg um vunnin rættindi.

- Nakað annað er so tað, at vit hava biðið um at fáa hesa skipan, sum gongur so nógv ár aftur í tíðina, dagførda.

## Avleiðingar

Stjórin vísir á, at nú Postverk Føroya arbeiðir undir heilt øðrum fyritreytum – og leingi hevur verið undir politiska luppinum, er neyðugt, at leiðslan hevur fingurin á "pulsinum".

Spurdur, um hann skilir, at trivnaðurin á Postverki Føroya, soleiðis sum formaðurin í Postfelag Føroya sipar til, er vánaligur, sigur Bergur í Garði:

- Jú, eg skilji væl, at tann ótryggleiki, sum hevur valdað um postverkið í so langa tíð, hevur havt sínar avleiðingar – bæði fyri starvsfólk og leiðslu. Tað er altíð keðiligt, tá ið ting leingi liggja í ógreiðu.

Bergur í Garði vísir á, at Postverk Føroya leingi hevur verið til viðgerðar á politiska leikpallinum.

- Hetta hevur havt sín kostnað, bæði fyri tey, sum arbeiða innan stovnin og tey, sum hava dagligu leiðsluna á stovninum, sigur postverksstjórin.